# úsinum

stereotypur. Pappfigurar. Deils er tað skrivað so grunnskygt, deils eru nógvir av leikarunum so óroyndir, at tað ikki verður meira spæl enn at kenslurnar sita uttaná klæðunum og spenningurin teirra millum ongantíð spennist stórvegis út. Kanska eru tey ikki heilt forankraði í leiklutunun enn. Hetta skuldi helst verið psykologisk realisma, so eitt minimum av trúvirði kundi verið ynskilig. Tó onkrir glottar eru, meir enn so, hjá øllum leikarum, men tann gysaratímin, sum tað kundi verið og sum byrjanin legði upp til, sakni eg.

## Pallmyndin

hevur Anna S. Egilstrøð gjørt, sera einfald við einum teppi á gólvinum og steinum, stabbum og lutum úr náttúruni. Hon hevur valt at nýta allan salin, umframt pallin. Áskoðarnir sita hvør sína megin við, meðan leikur fer fram sum ein ás gjøgnum salin og upp til pallin. At velja at áskoðarnir eru báðum megin við setir nakað av krøvum til leikarnir. Tað er tætt við, ágangandi og áleypandi, og skal hetta fyllast út. Her er onki at goyma seg aftanfyri. Tað tykist, sum Egi Dam, leikstjóri hevur stríðst eitt sindur við at fáa leikarnar burtur frá at goyma seg og veruliga royna at verða har, mitt á gólvinum, mitt á oynni, mitt í støðuni, sum hon er beint nú. At veruliga vera í ræðsluni og ikki spæla hana. Veruliga vera í kreppu, og ikki spæla hana, uttaná skræðuni. Og tað eyðnast stundum, at vit sleppa at kaga innum og verða vitni til hetta dramaið. Og tær løturnar er tað sera nærverandi og onkusvegna klaustrofobiskt at sita soleiðis og hygga yvir á áskoðarnar hinumegin.

Eina cadeau til Jón McBirnie, sum hevur gjørt ljóðmyndina, sum nærum allatíðina liggur sum ein døkkur undirtóni og spælir við. Í hesum reality stílinum riggar filmsljóð at spæla við undirliggandi kenslurnar. Ljóðið má bara ikki gera arbeiði fyri leikarnar, men halda eina javnvág og tað ger tað hegnisliga í hesum føri.

## Reality og zapp

Eg eri ein zappandi reality-TV freak. Eg eri von við skjótt tempo, skjót skift og at fleiri ting kunnu henda ísenn. Tí skal nógv til, fyri at eg tími at verða hangandi á tráðnum. Eini 15 ár við MTV hevur vant sjálvt mín heila við simultandramaturgi og skjótum klippum. Sum heild varð eg hildin á tráðnum, men í nógvum føri hevði eg zappað víðari. Nú ér hetta ikki sjónvarp, men sjónleikur, sum hevur aðrar lógir og fyrilit. Og eg gevi sjálvum leikritinum mestu skyldina. Men kortini meti eg, at skal sjónleikur vísa á eina verð, í hesum føri eitt fiktivt nútímans yvirlivsiskeið í einum lástum rúmi –eini útoyggj, har ikki slepst til ella frá- má spenningurin brýnast meira. Leikarnir mugu tora at kasta seg út í eitt sálarligt kaos og vísa vrangasíðuna á figurunum, og at fáa skiftini og tempoið og harvið dynamikkin á flog. Tá hugsað verður um, at leikur byrjar við einum álvarligum óhappi og at tað er hetta óhappi, sum er karmur um leikgongdina, dugdi eg als ikki at skilja, at tey vóru so pas rólig. Her átti at staðið meiri á, frá fyrsta sekundi.



Haraftrat tími eg ikki at lesa um, hvat leikurin handlar um í leikskránni og hvussu hann skal tulkast (enntá tvær ferðir!), eg vil sleppa at síggja og hugsa sjálv. Tað vilja tey flestu, vildi eg mett.

At týðarin velur at flyta leikin til Føroyar, hóast tað bert er í einari replik: "Í kvøld fara vit til Havnar við tyrluni" er áhugavert. Kanska kundi verið farið longur við tankanum. At leikurin setti spurningar so sum: Kundu vit havt slík skeiðir á útoyggj í Føroyum? Hava vit slík tilboð her á landið í dag? Hava vit føroyskar Mister og Master? Hví ikki.

Um tónin í ummælinum tykist neiligur, so havi eg kortini hug at siga, at hetta er áhugaleikur tá hann er ... (næst)bestur! Hví? Tí eg veruliga sleppi at síggja persónarnar; hetta er leikaradrama, um nakað eitur so? Ikki fjalt aftanfyri tøkni ella inni í einum kuk-kassa, so passaliga langt burturi frá áskoðarunum. Tey royna og tey kasta seg útav eggini og eg síggi nøkur potentiali, sum eg GLEÐI meg at síggja oftari á palli. Kanska við einum góðum leikriti næstu ferð.



